## DAGSINS MEINING

# Partabrævamarknaðurin

Nú fór 2001 afturum, uttan at ein føroyskur partabrævamarknaður sá dagsins ljós. Hetta er neyvan tað ringasta, ið er hent í farna ári. Tað er týdningarmikið at seta spurningin, hví man vil seta á stovn ein føroyskan partabrævamarknað.

Skal ein slíkur marknaður hjálpa føroyskum fyritøkum at reisa kapital? Er tað fyri at fáa gjøgnumskygni? Ella er tað kanska tí spekulativar kreftir vilja sleppa framataftur Føroya Banka og fiskiídnaðinum?

Sagt hevur verið, at fortreytin fyri einum føroyskum partabrævamarknaði er, at tær almennu fyritøkurnar sosum Føroya Banki og fyritøkurnar hjá Framtaksgrunninum skulu á ein slíkan partabrævamarknað. Tað má sigast at vera ein fallitterklering frá føroyskum vinnulívi. Er veruliga einki privat partafelag, ið vert er at gera íløgur í? Ella er veruleikin kanska tann, at allir sita tungt á sínum og vilja ikki loyva øðrum framat. Hvussu skulu vit so vænta, at hugburðurin broytist, aftaná hesir hava keypt eitt nú Føroya Banka.

Hetta er kjarnin í málinum. Einki er sum garanterar nóg stóran handil. Stóru feløgini koma at skifta eigara einaferð, og so fara onkrir snøklar at verða handlaðir, men um ein ordiligur marknaðarprísur skal fáast, so krevur tað eina ávísa volumen, ið neyvan fæst í Føroyum – ella fyri tað í Íslandi.

Insidara handil er eisini nakað, man má forða. Hvussu menn ætla sær at gera hetta, hevur eingin sagt nakað um.

Tað eru so nógvir spurningar, ið standa ósvaraðir, at vit ikki mugu lata almennu feløgini verða prøvikaninir í einum føroyskum partabrævamarknaði. Vilja menn hava ein partabrævamarknað, so lat teir skráseta sínar egnu fyritøkur á hesum marknað. Har eru nógv privat feløg, ið kunnu skráseta seg, sosum skipasmiðjur, reiðarí, alibrúk og annað. Almenn ogn eigur so ikki at verða brúkt í onkrum óvissum eksperimenti.

Tað er einki sum forðar føroyskum fyritøkum í at skráseta seg á altjóða partabrævamarknaðum. Hví ikki skráseta seg í Keypmannahavn, London, Frankfurt New York o.s.fr? Grønlandsbanken er skrásettur á Københavns Fondsbørs. Føroya Banki hevur saktans format til ein slíkan partabrævamarknað, um hetta einaferð verður eitt politiskt ynski.

Vónandi er projektið Partabrævamarknaður Føroya ikki enn eitt dømi um eina serføroyska dunnuhyljaskipan, tí krøvini til vinnulívið er ov hørð á einum ordiligum partabrævamarknaði.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Skúlin eitt landsmál

**Eyðólv Dimon**



**Tað finnast ongi dømi úr grannalondunum, sum vísa, at tað er ein fyrimunur at leggja skúlarnar út til kommunurnar at umsita, men nógv eru dømini um tað øvugta. Javnaðarflokkurin krevur at fólkaskúlin skal verða verandi eitt landsmál**

Tá kreppan kom var øllum greitt, at tað var nógv, ið skuldi skipast ørðvísi. Neyðugt var m. a. við einum greiðari umsitingar- og ábyrgdarbýti millum land og kommunu. Javnaðarflokkurin kom í 1997 við sínum boði um eina framtíðar kommunuskipan. Sjálvsagt kann ein politiskur flokkur í einum demokratii ikki vænta, at hann einsamallur sleppur at seta politisku kósina, tá grunnleggjandi broytingar skulu gerast. Tá er neyðugt at finna breiðar semjur og ikki arbeiða sum sitandi samgonga ger, nú hon ætlar at leggja fólkaskúlan út til kommunurnar.

**Allir borgarar sama skúlatilboð**

Javnaðarflokkurin fer ongantíð at góðtaka, at føroyingar verða býttir upp í fyrsta- og annanflokssmenniskju. Tey, ið hava alskyns tilboð og so hini, og hetta verður avleiðingin, um skúlin verður lagdur út til kommunurnar. Kommunurnar eru ógvuliga ymiskt fyri, og fólkaskúlin, sum skal geva næmingunum somu byrjan ella grundarlag at fara víðari í lívinum, fer í staðin at býta skúlanæmingarnar upp í tey, sum hava gingið í skúla í eini góðari kommunu og so øll hini. Kommunurnar hava í dag ábyrgdina av at keypa útbúnað og bøkur til skúlarnar, og her er longu í dag ein stórur munur millum støðuna í teimum ymsu skúlunum, og hetta vil Javnaðarfloksins uppskot rætta.

**Summi fingu teldur fyri 15 árum síðani onnur í fjør**

Klaksvíkin er eitt gott dømi. Hóast her er talan um næststørstu kommununa í landinum, so keypti Klaksvíkar kommuna fyrstu teldurnar til skúlarnar undanfarna skúlaár. Aðrastaðni í landinum høvdu fólkaskúlarnir havt teldur og telduundirvísing í 10 –15 ár. Um næststørsta kommunan í landinum hevur so lítla orku/vilja at røkja skúlan, hvat kann avleiðingin tá ikki gerast í kommunum, sum eru minni enn Klaksvík. Londini uttan um okkum fóru fyri fleiri árum síðan undir at leggja uppgávur út til kommunurnar. Men har finnast ongi dømi, sum vísa, at tað er ein fyrimunur at leggja skúlarnar út til kommunurnar. Í eitt nú verðins ríkasta landi, Noreg, eru nógv dømi um júst tað øvugta. Statskassin flýtur yvir í pengum, meðan óteljandi dømi eru um vantandi orku og beinleiðis vanstýring av t. d. fólkaskúlanum, eldraøkinum og øðrum økjum, sum kommunurnar hava ábyrgd av.

**Játtan og uppalingarligu skipanirnar hjá landinum**

Javnaðarfloksins støða er, at tíðin er komin til eina nýggja tíðarhóskandi kommunuskipan. Ein skipan, sum styrkir fólkaræði og leggur avgerðarrættin so nær borgaranum sum til ber. Tó eru ávís mál, ið verða betur røkt í hóskandi størri eindum og stýrd av økisráðum. Ráðum, sum verða vald beinleiðis samstundis sum kommunustýrini verða vald. Hesi skulu stýra skúlanum, men flokkurin heldur fast við, at landsumsitingin framvegis skal umsita fólkaskúlin, t.v.s. gera fíggjarætlan, játta peningin og taka sær av uppalingarligu skipaninum.

**Steðgið ætlanunum hjá landsstýrinum**

At roynt verður at gera langtíðarætlanir er at fegnast um, tó saknar ein álvaran aftanm fyri ætlanir, sum fevna um fleiri valskeið, um tær ikki eru grundaðar á samstarv millum allar flokkarnar á tingi ella í hvussu er teir 4 stóru. Kommunuætlanin er eitt grelt dømi, har sitandi samgonga arbeiðir eftir einum leisti, sum teir vita verður koldømdur av einum landsstýri, har Javnaðarflokkurin er í Tinganesi, og í dag benda øll tekin á, at Javnaðarflokkurin er felagsnevnarin í komandi samgongukabalum. Er tað tá rætt at brúka tíð og orku til eina ætlan, sum kolsiglur eftir løgtingsvalið.

# Skiparin var ódrukkin

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Herfyri skrivaðu vit um leitingina eftir útróðrarbátinum Eldorado úr Klaksvík, at hesin hevði verið ein ballingartúr í Nólsoy. Her er nakað komið skeivt fyri, tí bert tveir av teimum trimum monnunum, sum vóru við, vóru druknir og høvdu ballast í Nólsoy.

Skiparin hevði sjálvur ikki smakkað dropan, og meðan hinir báðir vóru í landi, hevði hann sovið. Hann var móður, tí hann hevði arbeitt síðan tíðliga á morgni við at fáa motorin úr Almu J. At hann hevði lagt seg var eisini orsøkin til, at hann ikki hevði hoyrt VHF ´in, tá vaktarskipini kallaðu. Og eisini var leyst samband í antennuni, sum gjørdi, at tað ikki hoyrdist so væl.

Eldorado hevði sleipað útróðrarbátin Almu J. úr Klaksvík og á Borðoyarvík, har báturin skuldi takast upp. Alma J hevði ongan motor og skal hava nýggjan ísettan.

Eldorado fór av aftur Borðoyarvík um fimmtíðina, og tá teir ikki vóru komnir fram klokkan tíggju um kvøldið, vórðu boð send til Vaktartanastuna. Brimil og Tjaldrið fóru at leita og eisini Alfapilot úr Klaksvík. Seinni komu eisini Norðan úr Klaksvík og ein bátur frá Trygdarmiðstøðini. Klokkan tvey um náttina fekk Vaktartænastan samband við Eldorado. Báturin var tá staddur uttanfyri Rituvík á veg úr Nólsoy norður til Klaksvíkar.

Vit umbera mistakið at vil av órøttu eisini hava lagt skiparan undir at hava verið druknan.


**Sosialurin**

Stovnaður: 1927

**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo

**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.


## VIÐMERKINGAR

# Er nakað lív eftir pensiónsaldurin?

**Malmberg D. Olsen**

Við árslok verða ymiskir titlar deildir út til persónar, sum á ein ella annan hátt hava útmerka seg í samfelagnum. Eitt nú ársins neyðrakett, ársins maður, ársins fótbóltsspælari, ársins virki og hvat vit nú kunnu nevna. Hví ikki ársins fiskimann eisini?

Men uppundir hvørt einasta val eru tað pensiónistarnir, sum eru so ógvuliga áhugaverdir, men hesin sýndi heiður man vera ógvuliga ivasamur tá hann skal vísast í verki, tá bránar hann eins og kavi fyri sól. Lítil ivi man verða um, nú tað aftur stendur eitt val fyri durum, at pensiónistarnir einaferð enn verða støvaðir av og brúktir til stemmufiskaríið.

Tað er gleðiligt at hoyra um tað framgongd, sum teir flestu samfelagsbólkar hava havt í árinum, sum fór, men tey veikastu í samfelagnum, sum ikki hava møguleika vegna skerdan førleika, at vera við í einum dagsverki, eru langt afturúrsigld og kunnu ikki tosa við, men tey hava tann ivasama heiður, at blíva nevnd tá val stendur fyri durum. Rætt skal vera rætt. Helena gjørdi ein bata, tá hon sat í landsstýrisstólinum og tað skal hon eiga eina tøkk fyri.

Tað hava nógvar bøkur verið skrivaðar um tað ættarlið, sum eru pensiónistar í dag, eitt nú bøkurnar um føroyingar, teir tóku land og teir, sum sigldu undir krígnum. Hesir menn settu seg ikki hendur í favn, sjálvt um teir ikki høvdu møguleika til at lívbjarga sær her á klettunum. Nei, teir sigldu einar 1600 fjórðingar vestur í hav og tóku land í Grønlandi og Íslandi, har teir bygdu sær skúrar at búleikast í 4-5 mánaðir av árinum. Arbeiddu á landi og róðu út undir primitivum korum, langt burtur frá heimlandinum, har teir vunnu til dagin og vegin. Hesir menn og konir teirra hava uppiborið eina virðiligari pensión enn tað, sum verður útgoldin í dag.

Vit standa á gáttini til eina alternativa vinnu, men mín vón er, at oljan ongantíð má køva okkara fiskivinnu, tá verður land okkara fátækt, sjálvt um oljupengar floyma inn í landskassan. Hugsa bara um tær avleiðingar tað fær fyri tey, sum arbeiða í fiskivinnuni. Um dagligdagin – lívið er nú einaferð meir enn bara krónur og oyrir – missa vit prátið um fiskarí mann og mann ímillum fara at práta um køld oljuføt ístaðin, verða vit ógvuliga fátøk. Um vit bert fara at síggja nakrar sleipibátar, ístaðin fyri bátar og skip, sum føra fong av grunni til lands, tá verða vit enn fátækari, sjálvt um oljan rennur í stríðum streymum. Eg fari at ynskja tykkum, sum skulu stýra, eitt gott hegni til at halda um stýrisvøl so tað ikki verða sett størri segl, enn báturin tolir.

Er nakað lív aftaná pensiónsaldurin var yvirskriftin. Eftir forsøgnunum nýggjárskvøld, skuldi tað verið hampuliga góðir møguleikar fyri einum sømuligum lívið aftaná pensiónsaldurin. Eg havi ikki hoyrt um nakran, sum er deyður vegna tað, at hann ella hon bleiv pensiónistur, men at tað er lítið meir enn ein aning, sum pensiónin strekkir til tori, eg at festa á blað við árs-skifti.

Spennandi verður at hoyra hvat fyri lokomotiv skal brúkast í valagitatiónini til komandi val, tað ræður um, at hava tað røttu menu'ina á matarseðlinum, livst so spyrst.

Gott nýggjár.

# Ein stórhending fyri Klaksvíkina og Norðoyggjar

**Jógvan við Keldu**
*løgtingsmaður*



Einmælda løgtingssamtyktin 20. desember var ein stórhending fyri Klaksvíkina og Norðoyggjar. Eg fegnist um, at Norðoyggjar og Klaksvíkin eru mítt valdømi, og at tað er her eg havi fingið loyvi til at virka og vónandi kann virka í komandi árum.

Mong vóru átøkini í farna ári, og framburðurin var sjónskur á flestu økjum.

Vinnan kom væl burtur úr árinum, oljuleitingin gav úrslit, arbeiðsstøðan í landinum var so góð sum helst ongantíð áður. - Við hesi arbeiðsstøðu vann føroyski borgarin meiri pening enn nakrantíð.

Búskaparviðurskifti Føroya hava ongantíð verið betri rótfest enn júst í hesum árum.

**Samskifti og samferðsla lykilin**

Fyri Norðoyggjar fer samtyktin, ið var einmæld, sum gjørd varð 20. desember um at seta á stovn partafelagið Norðoyatunnilin, í framtíðini at standa okkum øllum í minni, og verður hugsað 4 ár fram, og alt gongur eftir ætlan, fara vit at koyra millum Klaksvíkina og meginlandið.

Sjálvur havi ongantíð skilt, at politikarar og onnur áravís mótmæltu hesum framburði, og politik-arar saman við ávísum parti av fjølmiðlunum royndu at gera eina tílíka sjálvsagda útbygging til láturs.

Hósdagin 10. januar fara vit at hátíðarhalda gjøgnumskotið í Vágatunnlinum, sum helst stendur liðugur á sumri 2003.

Ein og hvør ið hugsaði nakað og fylgdi við í grannalondum okkara, so væl sum aðrastaðni sá, at hesin útviklingur mátti eisini koma til Føroya.

Góð samskifti og samferðsluviðurskifti er lykilin til stórar partar av framburðinum í framtíðini, nú tíðin er kostnaðarmikil – hvør minuttur kostar - og alt skal henda í eini rúkandi ferð bæði innan vinnulívið, men so sanniliga eisini innan mentan og ferðslu við eitt nú ítróttafólki o.ø.

**Gevur stóra ábyrgd**

Føroya Landsstýri og løgting góðu Klaksvíkini og Norðoyggjum, ja fyri alt tað øllum Føroyum, eina lívsjáttandi jólahátíð, og eina framtíðarvón so gylta í nýggja árinum.

Tað er sanniliga at fegnast um, og eg eri takksamur fyri, at øll tingfólk Føroya fólks atkvøddu fyri grundarlagnum fyri hesum risastigi inn í framtíðina hjá okkum, sum kann verða øllum, og ikki minst okkum klaksvíkingum og norðoyingum til stóran framburð.

Eingin av okkum eigur at taka hetta "fyri givið", men ábyrgd okkara er so sanniliga at henda íløga gevur seg aftur á øllum liðum, at Klaksvíkin og Norðoyggjar koma at geva upp aftur meira til landshúsarhaldið, enn vit longu hava givið.

Teldupostur:
keldu@post.olivant.fo
Heimasíða
www.get.to/keldu

# Spurningurin er ikki hvat er søguligt – spurningurin er hvat er møguligt

**Thomas Arabo**



Við vanligari beskeðinheit tosar formaður Tjóðveldisfloksins um "søguliga avtalu" á Fólkatingi. Samstarvið, norðuratlantisku fólkatingslimirnir hava, er kanska áhugavert uppá sín máta, men søguna haldi eg, at vit skulu lata eftirkomarar okkara meta um. Hvítabók skuldi vera søgulig, men hon tykist vera farin nokkso stillisliga í søguna.

Hvør veit? Kanska tað søguliga við hesari samgonguni verður, at hetta var samgongan, ið lat tað almenna stagnera. Hettar var samgongan, ið lækkaði almenna tænastustøðið, soleiðis, at vit ikki fáa post útbornan leygardag longur. Hettar var samgongan, ið ráddi fyri borgum, tá sjúkrahúsverkið byrjaði at detta sundur av berum forsømilsi. Eg las, í bløðunum at Landsverkfrøðingurin ikki fekk verkfrøðingar, at seta fyri teir, ið takkaðu fyri seg eftir, at Vinnumálastýrið hevði verið í holt við stovnin. Neyvan høvdu teir fingið nakrar, um so var, at nokk var til av verkfrøðingum.

Alt hetta hevur Tjóðveldisflokkurin medábyrgd av, og skal formaður Tjóðveldisfloksins ikki gloyma tað. Tjóðveldisflokkurin var ein góður stuðul tann tíð tað var, tá nógv av omanfyristandandi varð ment í sjeytiárunum, og harmiligt hevði verið um alt nú datt niðurfyri av berum einoygni.

**At tosa vegna onnur**

Tað er ikki eiti á, hvussu væl tað liggur fyri at tosa vegna onnur. Fyrst tosaði nýggja leiðslan í Tjóðveldisflokkinum vegna føroyingar. Nú tosar Høgni Hoydal vegna allar Javnaðarflokkar í heiminum. Álvaratos, lat okkum koma niður aftur á jørðina og hugsa um úrslit.

Úrlsitið, sum Tjóðveldisflokkurin vil hava, má røkkast í Føroyum. Stór skomm er, um Tjóðveldismenn noyðast at mobilisera útlendskar kreftir, tí teir ikki megna at fáa ein meiriluta í Føroyum. Hví ikki gera avtalu heir heima við ein flokk um at koma hálvan vegin móti fullveldi, sum heldur, heldur enn at gera eina avtalu við ein annan flokk, um at fara allan vegin, sum ikki heldur.

**Gevist við undirlutakensluni**

Um vit høvdu skullað lurtað eftir undirbrotligheitini hjá mest afturhaldssinnaðu tjóðveldismonnum, so høvdu vit ikki havt avtalur við onnur lond, sosum fiskiveiðuavtalur, tí hesir trúgva í grundini ikki uppá, at vit hava rættin til nakað sum helst uttan fullveldi.

Hvør hevur ikki álit á føroyskan mátt og megi? Hvør trýr ikki uppá rættin til nakað, uttan vælsignilsi frá Christiansborg? Tað eru menninir, sum tosa um nalvastrong hjá øðrum.

Føroysk javnaðarfólk tora at trúgva uppá seg sjálvi – vit eiga rættindi, og tørva ikki at fáa fólkatingið at viðurkenna hetta og hatta. Tað er einki annað enn ein manifestatión av føroyskari undirlutakenslu, tá Tjóðveldismenn vilja hava danska fólkatingið at viðurkenna føroyar sum tjóð. Vit eru ein tjóð og spyrja ongan eftir um tað. Vit hava okkara rættindi til ráevnini í undirgrundin og skulu Tjóðveldismenn ikki niður á Fólkating at aka á knøum fyri at biða um nakað vit longu hava.

**Fá samfelagið at rigga**

Vit eru ikki ein natión í ST høpi, men tað kunnu vit verða í morgin um vit vilja, men tað vilja vit ikki í løtuni.

Hettar fær Høgni Hoydal einki gjørt við, men nógv annað liggur á láni í hesum samfelagnum – sjúkrahúsverkið er eitt av mongum. Tíð er at fara til arbeiðis Høgni Hoydal. Tað handlar ikki um hvat er søguligt, men um hvat er møguligt.